Granska alivinnuna:

# Mugu seta krøv til útlendskan pening

**Sorgarleikurin í Vági, har Pan Fish tók seg úr alivinnuni og lat eftir seg eitt stórt arbeiðsloysi í Suðuroynni, er eitt gott dømi um, hvussu man ikki skal lata útlendingar fáa frítt spæl í alivinnuni. Heldur eiga vit at seta hørð krøv til útlendingar, sum vit gjørdu í fyrireikingunum til oljuvinnuna, heldur Gestur Hovgaard, ið er við í eini drúgvari kanadiskari granskingarverkætlan, ið eisini kannar alivinnuna í Føroyum.**

ALIVINNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Granskingardepilin fyri Økismenning hevur seinasta árið verið partur í drúgvari kanadiskari verkætlan innan alivinnu. Verkætlanin við heitinum Aquanet, leggur seg eftir at kanna bæði náttúruligu og samfelagsligu liðini í alivinnuni, bæði hvat lærdóm vit higartil hava fingið og hvussu framtíðin sær út.

Altjóða sæð, hevur alivinnan verið ein tann skjótast vaksandi vinnan, og hon hevur fleiri røddir hava verið frammi um, at alivinnan møguliga fer at vera við til loysa matvørutrupulleikan í serliga triðja heiminum.

### Fjølbroytt verkætlan

Gestur Hovgaard, ið standur fyri føroyska partinum av verkætlanini sigur, at kanadiska verkætlanin er rættiliga fjølbroytt.

Har eru náttúrufrøðingarnir, íð eitt nú hyggja at arvalæruni,fóðuri og sjúkum hjá alifiski. Serliga spurningurin um genetiska manipulasjón ella ikki, stendur frammalaga í kjakinum, har tey positivu mest síggja møguleikan í at framleiða ein so góðan fisk so bíliga sum gjørligt, meðan tey ivasomu taka atlit til teir umhvørviskostnaðir, ið kunnu standast av at "framleiða" ein tílíkan laks.

### Samfelagsliga granskingin tekur onnur atlit

– Samfelagsligi parturin av verkætlanini hyggur m.a. at tí globalisering av vinnuni, sum farin er fram seinastu árini, og hvønn týdning hetta hevur á tey øki, sum alt verður á. Ein viðkomandi spurningur er til dømis, hví alivinnan klárar seg væl í summum pørtum av heiminum, og ikki í øðrum, greiðir Gestur Hovgaard frá.

Tað er av altstórum týdningi, at vit royna at vera við í tílíkum verkætlanum, tí alivinnan hevur stóran týdning í føroyska búskapinum, og hóast núverandi kreppuna, kemur hon eisini at hava stóran týdning framyvir. Ein ógvuliga viðkomandi partur av samfelagsgranskingini er at savna ta vitan ein so skjótt broytilig vinna kann geva okkum, her hjá okkum og aðrastaðni. Hetta gera vit millum annað gjøgnum samanberingar við onnur lond, og hetta gera vit eisini við at eitt nú náttúrufrøðin og samfelagsfrøðin "práta saman". Tað er m.a. hetta sum ger Aquanet verkætlanina áhugaverda, ikki minst tá man skal royna og byggja upp eina føroyska vitan á økinum. Meir kann lesast um hesa verkætlan á www.aquanet.ca

### Krøv til útlendingarnar

Ein tann mest átroðkandi spurningurin fyri føroyska alivinnu í løtuni, er spurningurin um útlendskan kapital. Fyrr í summar setti landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, ein bólk niður at arbeiða við spurninginum við framtíðini føroyskari alivinnu. Høvuðsspurningarnir vóru, hvørt útlendingar skulu sleppa framat føroysku alivinnuni og um bankarnar skulu fáa loyvi at fáa veðhald í aliloyvum.

Gestur sigur, at hetta eru ógvuliga viðkomandi spurningar, sum hann tó ikki beinleiðis hevur granskað í. Tá spurningurin kemur inn á útlendskan kapital, er hann tó rættiliga avgjørdur.

– Eg eri ikki bangin fyri útlendskum peningi og risafyritøkum. Men eg haldi greitt, at vit mugu tora at seta krøv til útlendskan kapital, og standa við hesi krøv, um neyðugt.

Í eitt nú Kili eru tað globalar fyritøkur, ið eiga meginpartin av alivinnuni, og man kann ivast í, hvat liggur eftir lokalt. Ein av høvuðsspurningunum má tí verða, hvussu vit í Føroyum sleppa undan, at stórar altjóða fyritøkur drena tilfeingið, so einki liggur eftir. Vit mugu seta okkum spurningin um tað er nóg mikið, at ein global fyritøka kemur til Føroya og gevur okkum nøkur arbeiðspláss?, sigur Gestur Hovgaard.

Vágur er kanska eitt gott dømi um hvat hendir, tá tað gongur galið. Pan Fish kemur sum ein risafyritøka inn, men gongdin vísti, at stórt er ikki altíð gott, og eftir standa nógv fólk uttan arbeiði. Tí er tað týdningarmikið, um meiri globalur kapitalur skal inn, at vit tryggja okkum, at tað ikki einans eru fólk á kontórum í tilvildarligum stórbýum, ið avgera lagnuna hjá føroysku alivinnuni. Tað kann stutt sigast soleiðis, at vit mugu ansa eftir, at man ikki privatiserar - ella globaliserar - vinningin, meðan man almennagerð - ella lokaliserar - trupulleikarnar.

Samstundis heldur Gestur at tað uppá standandi fót er ringt at geva eitt svar uppá, hvat man kann gera í núverandi støðuni, og samstundis forða fyri ógvusligum avleiðingum. Men kanska ein byrjan kundi verið, at ali-≤vinnan lærdi av oljuvinnuni. Har hava myndugleikarnir royndir í at seta krøv, sum kanska kunnu yvirførast á alivinnuna.

Spurdur um vit framhaldandi eiga at forða útlendingum at eiga meir enn 33%, hóast vinnan skríggjar eftir kapitali, svarar Gestur, at vit eru noydd at fyrihalda okkum til veruleikan, vit liva í, og at møguliga skuldi hurðin verið opnað meiri fyri útlendskum kapitali, men aftur her mugu vit ikki gloyma at seta krøv.

– Vit mugu ikki vera so naiv, at halda at globalar fyritøkur seta pengar í føroyska alivinnu, tí teir halda, vit eru so fittir. Teir vilja sjálvandi vinna pening og taka sær av áhugamálunum hjá eigararnum, og tá hesir ikki eru staddir í Føroyum, ja so fara teir út av landinum. Tað er tað kanska onki galið í, men vit mugu fyrihalda okkum til hvat skal liggja eftir.

Gestur peikar samstundis á, at hann ikki er í iva um, at ein orsøkin til, at føroyska alivinnan hevur roynst væl, er júst tað, at vit hava havt eina skipan, har tað bæði hava kunna verið lokalar og globalar fyritøkur (t.d. Pan Fish) í vinnuni. Hetta tryggjar eitt fjølbroytni ið er ein avgerandi fyritreyt fyri ta nýskapan, sum er so týdningarmikil fyri vinnuna. Hetta fara vit at venda aftur til í aðrari grein um alivinnuna.



*– Vit mugu ikki vera so naiv, at halda at globalar fyritøkur seta pengar í føroyska alivinnu, tí teir halda, vit eru so fittir. Teir vilja sjálvandi vinna pening og taka sær av áhugamálunum hjá eigararnum, og tá hesir ikki eru staddir í Føroyum, ja so fara teir út av landinum. Tað er tað kanska onki galið í, men vit mugu fyrihalda okkum til hvat skal liggja eftir, sigur Gestur Hovgaard*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Menningin sprettur frá einstaklinginum

**- Tað er týdningarmikið at halda positivum hugburði uppi, nú hildið verður, at vit ganga móti verri tíðum, segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tá ið hann setti Vørumessuna 2003**

VØRUMESSAN 2003
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, sum setti Vørumessuna 2003. Setanin fór fram seinasta fríggjamorgun – beint eftir, at hurðarnar í ítróttarhøllini á Nabbi vórðu latnar upp.

Landsstýrismaðurin takkaði fyri, at honum varð litið í hendur at seta messuna, og hann segði seg kenna hetta sum eina gleði og ein heiður.

Hann helt tað vera lívsjáttandi, at handilsstevnur og vørumessur aftur eru á skránni.

- Hetta er ímyndin av, at tað aftur grør um gangandi fót, sum hann tók til.

### At stuðla…

Landsstýrismaðurin vísti á, at endamálið við eini slíkari stevnu er at stuðla føroyskum heilsølum, framleiðarum og umboðum at marknaðarføra teirra vørur og tænastur.

- Handilsliðið er ein sera týdningarmikil partur í samlaðu prosessini at fáa vørur og tænastur út til viðskiftafólkini.

Bjarni legði aftrat, at í handilsliðnum fer mangan fram tann størsta einstaka virðisøkingin, og handilsliðið stendur fyri stórum parti av samlaðu lønarútgjaldingunum.

- Tað er týdningarmikið við slíkum tiltøkum, sum kunnu vera við til at halda positivum hugburði uppi, nú hildið verður, at vit ganga móti verri tíðum.

Hann helt, at myndugleikarnir mangan hava givið hesum tiltøkum lítlan ans – og kanska hava teir eisini ypt øksl.

- Men eg haldi, at slíkar handilsstevnur og vørumessur hava sera stóran týdning fyri borgaran og vinnuna sum heild.

Bjarni vísti á, at stórt virksemi á hesum øki er við til at skapa kapping, sum er sunn fyri borgaran og brúkaran.

- Tá ið brúkarin hevur møguleikar, og tí er vardur í kappingini, minkar hetta um politiska íblandan, har lógarinntriv og umsitingarlig tiltøk oftast skerja virkisfrælsi og harvið avmarka møguleikarnar fyri nýskapan.

### Politisk kvaling

Bjarni Djurholm segði, at hann ofta hevur hugsað um, hvørji lyndiseyðkenni merkja vinnulívsfólk og sølufólk – hesi, sum smidliggera samfelagið og gera tað livandi og spennandi.

Í røðuni kom hann tó ikki við nakrari niðurstøðu í hesum sambandi, men helt, at tann týdningur, at hesi fólk sleppa at virka, eigur ikki at undirmetast.

- Aðrastaðni hevur verið roynt politiskt at kvala hetta lyndi og hugin við at lata statin regulera hetta lívsneyðuga virksemi – og tey úrslitini kenna vit.

Bjarni tosaði í hesum sambandi um "steinrunnin" samfeløg, har brúkarin onga gleði hevði av virðisøkingini, hann veitti samfelagnum.

- Tí áliggur tað politisku myndugleikunum at fremja karmar, har virkis-og skapanarhugurin sleppa at virka. Menningin av samfelagsbúskapinum eigur at spretta frá einstaklinginum – og ikki sum boð frá myndugleikunum.

### Framhaldandi menning

Landsstýrismaðurin segði seg vóna, at føroysk vinna framhaldandi fer at menna seg, samstundis sum ansað verður eftir, at aktiviteturin verður hildin á einum passandi støði.

At enda ynskti Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, góða eydnu við hesum handilsliga tiltaki og lýsti Vørumessuna 2003 at vera setta.

# Poul Hansen hevði vakrasta básin

*Bæði vitjandi og framsýnarar vóru samdir um, at básurin hjá Poul Hansen var hin vakrasti á Vørumessuni 2003*




**- Vit eru væl nøgdir við talið av vitjandi, sum var eini 30% størri í ár enn sienasta ár, sigur Birgir Poulsen**

VØRUMESSAN 2003
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stigtakarin til Vørumessuna, sum nú hevur seks ár á baki, Birgir Poulsen í Saltangará, er væl nøgdur við talið av vitjandi í ár.

- Vit høvdu stívliga 1800 fólk inni á gólvinum hesar tríggjar dagarnar, stevnan vardi, og tað eru vit væl nøgdir við.

Hann sigur, at hetta er eini 30% fleiri enn á messuni seinast.

- Vit hava stívliga 2.200 skrásett vinnurekandi í Føroyum, so vit halda, at hesi hava verið rættiliga væl umboðaði á Vørumessuni.

Stigtakarin sigur, at stevnan eydnaðist stak væl, og bæði framsýnarar og vitjandi lótu hoyra frá sær, at tey vóru væl nøgd.

- Eg haldi, at framsýnararnir gjørdu uppaftur meira burtur úr básunum í ár enn seinasta ár, og tað skapar ein serstakan hugna, sigur Birgir.

### Vakrasti básur

Í ár høvdu bæði vitjandi og framsýnarar høvi at atkvøða um, hvør vakrasti básurin var á messuni.

Birgir sigur, at báðar atkvøðugreiðslurnar fullu á básin hjá Poul Hansen.

- Sum virðisløn fekk Poul Hansen eitt borðurð við áskriftini, "Vakrasti básur 2003", umframt 12 fermetrar ókeypis til komandi Vørumessu, sum verður í døgunum, 10.-12. september.

Stigtakarin sigur, at hesir fermetrarnir hava eitt virðið av kr. 12.000, sum kann verða gott aftrat hjá eini fyritøku til komandi messu.

### Størri messa

Birgir Poulsen sigur, at firmaið Marknaðarføring, sum stendur aftanfyri Vørumessuna, arbeiðir við at gera messuna størri komandi ár.

- Júst, hvussu hetta verður gjørt, er ikki greitt enn, men vit arbeiða við ymiskum møguleikum.

Hann sigur, at Vørumessan selir seg sjálva, tí tað er ikki neyðugt at bjóða básaplássini fram.

- Tað er heldur soleiðis, at vit noyðast at avmarka talið av framsýnarum, tí plássið á Nabbi er avmarkað, sigur Birgir.

### Móttøkuskipanin

Í ár royndu tey eisini eina nýggja móttøkuskipan á messuni.

- Hetta er nøkulunda sama skipan, sum tey brúka í øðrum londum, har tílíkar messur eru.

Birgir sigur, at fólk, sum vitjaðu, vórðu skrásett við navni á fyritøkuni ella stovninum, tey umboðaðu, umframt sínum egna persónsnavni.

- Hetta riggaði væl, men verður uppaftur betur komandi ár, nú flestu fyritøkurnar eru skrásettar í skipanini.

Hann sigur, at einki forrit er tøkt til slíka skipan í Føroyum, men hesum fer Marknaðarføring at arbeiða við fram til komandi ár.

- Tað ger tað lættari hjá fyritøkunum, sum eru á básinum, at tey vita, hvør tað er, tey tosa við, sigur Birgir Poulsen at enda.